

# Annar maðurin er nú fríur fuglur

**BMW-MÁLIÐ** Teir báðir litavarnir, sum hava sitið varðhaldsfongslaðir í Føroyum síðan 13. november í fjør, fingu ikki sama dóm. Øðrum stendur frítt at fara heim, men hin skal í fongsul, helst í Danmark

Randi Jacobsen
Tekning: Janus D. Guttesen

Nevningatingið hósmorgunin byrjaði við, at juridiski dómarin gav teimum tólv nevningunum, sum døma í málinum móti teimum ákærdu litavunum, eina leiðbeining.

Hann minti nevningarnar á, at teir ikki vóru heftir av sjónarmiðum hansara, men hann nevndi, hvat hann helt, at nevningarnir skuldu hefta seg við, og hvat hann helt hava týdning.

Hann nevndi m.a. fleiri ákærupunkt, sum hann ikki helt prógv verða funnin fyri.

Møguleikin fyri frídøming hekk líkasum í luftini.

Nakað fyri klokkan trý seinnapartin vóru nevningarnir komnir til sína niðurstøðu.

Tann 22 ára gamli maðurin varð funnin sekur í at hava smuglað umleið fýra kilo av sterkum rúsevnum í bili til Føroya. Hin varð frídømdur.

Ríkiskassin rindar allar sakarmálsútreiðslurnar.

Orsøkin til munin kann hugsast at vera, at tann frídømdi ikki kendi leikararnar í smuglaramálinum, men tað gjørdi hin. Tann frídømi kom bara við, tí bileigarin settist aftur.

Tá ið dómarnir vóru sagdir, segði tann frídømdi maðurin nøkur orð:

– Eg eri fegin um, at tit trúðu mær og frídømdu meg.

Tá ið nevningarnir komu við niðurstøðuni, var lagið á tí yngra manninum alt annað enn gott. Tað var eisini hann, sum bukkaði undir í isolasjónini.

## Uggaði tann dømda

Tann frídømdi var sjálvsagt ovurfegin og klemmaði sakførara sín Jógvan Páll Lassen.

Úti í túninum fóru teir báðir litavarnir til viks, og tað sást, at tann frídømdi royndi at ugga hin, sum løtu eftir varð fluttur aftur í varðhaldið, har hann hevur sitið nú í meira enn hálvt ár.

Hin og sakførari hansara høvdu einki ímóti at práta.

Jógvan Páll Lassen var fegin um, at maður hansara var frídømdur. Hinvegin harmaðist hann um, at hin varð dømdur sekur.

Eitt stórt smíl sendi tann frídømdi Genrik Karuzel áhoyrarunum, tá ið hann segði, hvussu fegin hann var, og hann rósti verja sínum, sum hann helt vera ein av teimum best hugsandi sakførarunum.

## Heim at giftast

Genrik Karuzel er trúlovaður heima í Litava, og hann gleddi seg til at koma heim til hennara.

– Nú skulu vit giftast, segði hann.

Sjálvt um tað hevur verið hart at sita avbyrgdur í varðhaldinum, er Genrik Karuzel komin nógv betur gjøgnum teir tríggjar mánaðirnar í isolasjón enn makkari hansara. Hann kropsvandi og dikti so nógv á við at rippa húkar, at hann kundi senda pening heim til síni í fátæka landinum Litava.

## Fær væl burturúr

Við tað, at hann hevur sitið varðhaldsfongslaður og varð frídømdur, fær maðurin endurgjald frá úr danska ríkiskassanum.

Og tað er ikki einki. Gjaldið er 5.300 krónur fyri fyrsta samdøgrið, og síðan 650 krónur fyri hvørt samdøgur. Í isolasjón er gjaldið 900 krónur fyri samdøgrið.

Ein leyslig útrokning sigur, at maðurin hevur rætt til góðar 160.000 krónur í endurgjaldi.

Ikki so galið hjá manninum at fáa, nú hann fer heim at stovna familju.

Úr rættarhølunum fylgdist frídømdi maðurin við sakførara sínum.

– Nú er hann fríur maður, og vit fara oman í býin at fáa okkum ein góðan bita, segði Jógvan Páll Lassen.

randi@sosialurin.fo